


# Atlantic Petroleum keypir leitimið í lovandi gassøki í Norra

**Jan Müller**

30.04.2014 - 14:43

Oljan.fo

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum er nú av álvara partur av einum sera lovandi gassøki í Norskahavinum og fer felagið undir at bora ein brunn á Ivory leitimiðinum í seinnu helvt av 2014.

Atlantic Petroleum hevur avgjørt at keypa 15% av tveimum loyvum í Norskahavinum frá oljufelagnum Rocksource ASA.

Oljufelagið Centrica er fyristøðufelag á loyvunum við 40%. Statoil hevur 35% og Rocksource 10% eftir søluna av 15% til Atlantic Petroleum.

Annað loyvið PL528 fevnir um áhugaverda Ivory leitimiðið, sum verður borað í seinnu helvt av 2014. Tað goymir gass og liggur tætt við stóru gasskelduna Aasta Hansten, har Statoil er fyristøðufelag og sum verður klár til framleiðslu í 2017.

Atlantic Petroleum metir  Aasta Hansteen økið sum eitt av framtíðar leitiøkjunum í Norskahavinum. Statoil hevur eisini gjørt av at byggja út Aasta Hansten sum eitt slag av kjarnuøki fyri onnur felt eisini. Hetta verður eisini grundarlagið undir eini nýggjari gassleiðing í hesum økinum. Tí verður umráðið, sum Atlantic Petroleum nú eisini er partur av, mett sum ein nýggjur gasslandslutur á norska landgrunnimnum.

Við keypinum hevur Atlantic Petroleum nú tryggjað sær ognarlut í ikki færri enn fýra týðandi loyvum í nýggja gasslandslutinum, sum oljuvinnan væntar sær nógv av.

**Ben Arabo, stjóri sigur, at felagið er sera væl nøgt við hetta keypið, sum tryggjar tess støðu í hesum so týðandi og lovandi økinum. "Vit halda eins og onnur oljufeløg, at hetta økið goymir týðandi nøgdir av kolvetnum** *og fara vit nú at vera ein virkin partur av leitingini.*

*Jonny Hesthammer, stjóri í* Atlantic Petroleum Norge, sigur í eini viðmerking: *" Ivory leitimiðið er sera stórt. Fyrr í ár tryggjaðu vit okkum lut I elektromagnetiskum data, og okkara tøkningar hava brúkt fleiri mánaðir til at tulka tilfarið saman við geologiskum og geofysiskum data. Eg kann siga so mikið, at úrslitið av kanningunum er sera positivt og eru vit av tí sannføring, at eitt fund á Ivory leitimiðinum kann gerast nógv vert fyri Atlantic Petroleum. Og eitt fund her kann eisini fáa stóran týdning fyri onnur leitimið hjá Atlantic í hesum økinum," sigur norski stjórin.*